## Símun og teir taptu

IA av Akranesi vann 2-1 á Keflavík í íslendsku landskappingini mikukvøldið. Føroyski landsliðsspælarin Símun Samuelsen var við á liðnum hjá Keflavík, men hann fekk einki stig við sær heimaftur. IA legði seg á odda 2-0, áðrenn Keflavík minkaði fimm minuttir fyri leiklok. Í sambandi við málið fekk málmaðurin hjá IA reyða kortið fyri at gera seg inn á Símun Samuelsen, men IA fekk sigurin heim hóast tað.



## Tillukku til Juttu

Á heimasíðuni fyri oyggjaleikir er eitt yvirlit, har føðingardagarnir hjá einstøku íðkarunum eru at finna. Á síðuni er soleiðis eisini eitt yvirlit yvir, hvør hevur føðingardag fyri hvønn dagin. Og í dag kunnu vit so ynskja Juttu Thomsen tillukku, nú hon verður 17 ár. Um talan so verður um eins gyltan føðingardag, sum hinir tríggir svimjidagarnir, fáa vit staðfest í kvøld.

# Skutu nýtt met til Føroyar




*Fimm føroyingar skutu um heiðursmerki, og fýra teirra fingu eitt, tá head to head kappingin var í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Aftur í gjár skutu bogaskjúttarnir fleiri heiðursmerki heim til Føroya. Tvær gull, eina silvur og eina bronsu gjørdist tað til, tá kappast var ein ímóti einum**

BOGASKJÓTING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tá bogaskjúttarnir byrjaðu at skjóta í gjár, høvdu Føroyar tilsamans 14 gullheiðursmerki. Tá bogaskjúttarnir vóru lidnir at skjóta, høvdu Føroyar 16 gullheiðursmerki. Hetta er tað mesta nakrantíð, og sostatt skutu bogaskjúttarnir Føroyar til nýtt met á oyggjaleikunum. Eitt met, sum varð bøtt seinni í gjár, tá svimjararnir hálaðu trý gull heiðursmerki heim aftrat.

Tað tekur tó einki frá avrikunum hjá bogaskjúttunum, sum mugu metast at vera framúr góð.

### Sigrid sigraði

Kappingin var skipað á sama hátt, sum eitt slag av cup-kapping. Kappast var ein ímóti einum, vinnarin fór víðari og taparin reyk út. Til hetta slag av kapping krevst konsentratión, disiplin og so eginleikin, at vera kaldur og hava tamarhald á nervunum, tá á stendur.

Byrja vit við kvinnuliga gullinum, so livdi Sigrid Vang upp til alt hetta. Hon setti tríggjar bogaskjúttar av á vegnum til finaluna, sum gjørdist rættuliga spennandi. Tá teir tríggir pílarnar vóru skotnir fýra ferðir, sum gjørt verður í finaluni, stóð á jøvnum. Tískil var neyðugt við eykaskotið. Har snýr tað seg bara um at vera tættast miðjuni. Tað var Sigrid og tískil gjørdist gullið hennara.

Hetta var í compound, og í recurve gekk næstan líka væl. Har var Annika Vang í finaluni, men tapti í síðsta enda, soleiðis at hon stóð eftir við silvurheiðursmerkinum.

### Jógvan tríggjar gull

Í compound hjá monnum tók Jógvan gullið. Á vegnum í finaluna møtti hann Per Holm Andersen, sum sá út til at skula basa Jógvani. Men av onkrari orsøk gloymdi Per at skjóta seinasta pílin, so Jógvan fór víðari og allan vegin upp í topp. Tað merkir, at hann nú hevur tríggjar gull medaljur, og hevur møguleikar fyri at fáa eina fjórðu í morgin, tá head to head liðkappingin verður.

> **Fakta:**
>
> **Head to head competion:**
> Sigrid Vang, gull
> Jógvan Niclasen, gull
> Annika Vang, silvur
> Absalon Hansen, bronsa

### Føroyskur bronsudystur

Í recurve hjá monnum vóru ikki færri enn 128 luttakarar. Teirra millum Absalon Hansen og Hans Petur Højgaard, sum endaðu við at spæla bronsudyst hvør móti øðrum. Her dróg Absalon longra stráið, og vann bronsuna. Men sum hann sjálvur tók til eftir dystin, so var tað týdningarmesta, at heiðursmerki kom til Føroya, og ikki hvør fekk tað.